FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

# Avtala um formenn hjá Landsverki

Vísandi til § 22 í sáttmálanum millum Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna øðrumegin og Fíggjarmálaráðið hinumegin, er gjørd henda avtala um formenn hjá Landsverki.

Formenn hava somu arbeiðstíð sum aðrir handverkarar. Sambært § 3, stk. 2 í sáttmálanum er arbeiðstíðin 39,5 tímar um vikuna íroknað ½ tíma mattíð um dagin.

Formenn eru løntir á stigi 21 og 22 í lønartalvuni.

Fáa formenn útgoldið yvirtíðargjald, verður tímalønin roknað sum formannsársløn býtt við 2080.

Gera formenn bergholsarbeiði, fáa teir eitt ískoyti, sum er 8,28 % av tímalønini fyri hvønn tíma sum hetta arbeiðið varir.

Annars er sáttmálin, har stríð ella mótsøgn ikki er við omanfyristandandi, galdandi fyri formenn.

Hendan avtalan kemur í gildi tann 1. november 2023 og samstundis fer avtalan um formenn hjá Landsverki dagfest 14. September 2011 úr gildi.

Tórshavn, tann 22. desember 2023

Føroya Handverkarafelag

Fíggjarmálaráðið

Landsfelag Handverkaranna

Tinganes • Box 2039 • FO-110 Tórshavn
☏ (+298) 35 20 20 • fmr@fmr.fo • www.fmr.fo